# Gamlar myndir úr Vágum

*6. partur*

**Hesar myndir eru úr savninum hjá Karl Joensen og Valborg Svaðabúð í Miðvági. Fólk eru vælkomin at gera viðmerkingar til myndirnar, kontaktpersónur er Georg Hansen, hann hittist á telefon 333066**



*A 28: Mikkjal á Ryggi, Sørin Danielsen og Jógvan bóndin reiða*



*A 27: Sámal Jákup Niclasen og Godtfred Heinesen hjá Julionnu*



*A 25: Joen Heini Joensen 1884-1973 og Anna Elisabeth J. 1884-1966*



*A 23: Jóhanna Kathrina Joensen 1845-1921 bóndakona á Ryggi*



*A 24: Joen Heini Joensen, Bónda-Heini, 1884-1973*



*A 26: Í Skúlanum, hjá Jákup Paula, Dansistovan, hjá Tummas Johansen (Boys), hjá Jákup Paula Joh., hjá Hans Nicláa og hjá Jógvan Heinesen*



# Væleydnað hugna- og mótakvøld



*Modellirnar gingu í millum fólkini, sum sótu og nutu eina góða máltíð*

*Mynd: Gissur Pætursson*



*Tað riggaði avbera væl, at kvinnur gingu í klædningum.*

*Mynd: Gissur Pætursson*



*Modellirnar virkaðu sera væltrenaðar og var onki at seta fingurin á*

*Mynd: Gissur Pætursson*

**Fríggjakvøldið 8. november var ein lítil mótaframsýning í Marco Polo. Janus Poulsen, sum er í læru hjá Hans Joensen á Hálsi skipaði fyri mótaframsýningini, sum er ein partur av hansara endaligu uppgávu**

MÓTI
*Solby A. Eliasen*

Hetta kvøldið var Marco Polo pyntað við ymiskum, ið hoyrir mótanum til. Klæðini, ið vórðu sýnd fram vóru til mannfólk, men kortini vóru kvinnuligar modellir eisini.

Nakað av fólki var samlað til hetta kvøldið, og tey fingu eina trýrættaða máltíð.

Kvøldið byrjaði við, at tey fingu forrætt og høvuðsrætt, og tá fólk vóru nærum liðug við at eta høvuðsrættin, byrjaði mótaframsýningin. Modellirnar, bæði menn og kvinnur, gingu millum gestirnar og samstundis gingu servitrisurnar runt og syrgdu fyri, at ongin manglaði nakað.

Janus Poulsen sigur, at hetta var ein partur av endaligu uppgávuni hjá honum.

- Hetta var tann praktiski parturin av uppgávuni, sum fer at snúgva seg um menningina av eini nýggjari linju til ung mannfólk, greiðir Janus Poulsen frá. Hann verður liðugur við sína útbúgving í januar ella februar.

Hann sigur, at hann hevur hugsað um at skipa fyri einum tílíkum tiltaki longi, og at tey hava tosað nógv um tað í handlinum eisini.

- Einaferð hugsaði eg um at skipa fyri onkrum tílíkum í Grasagarði, men tað bleiv so ikki til nakað. Og nú var so langt útliðið, at tað var tíð upp á, at fáa henda partin av uppgávuni avgreiddan, sigur hann.

Og tað fekk hann so næstseinasta fríggjakvøld í Marco Polo. Alt í alt eitt sera hugnaligt og væleydnað kvøld, so nú er bert eftir at vóna, at lærlingurin fær gott ummæli fyri hetta tiltak, har hann hevði megnað at seta mat og hugna saman upp á ein sera avslappandi máta.



*Janus Poulsen, sum er í læru hjá p/f Hans Joensen á Hálsi, skipaði fyri móta og hugnakvøldinum sum ein partur av hansara endaligu uppgávu*



*Servitrisurnar gingu runt og syrgdu fyri, at ongum manglaði nakað*

*Mynd: Gissur Pætursson*